gult16 cyan16 magenta16 svart16



GÍ-EB/Streymur 4-0 (0-0):

# GÍ heldur stílin

**Miðverjarnir tykjast rættuliga at vera komnir fyri seg, og frammi á vøllinum er stevið eisini betri, enn tað hevur verið leingi**

1. DEILD
*Jóannes Hansen*




*Sámal Joensen og GÍ vóru greitt við yvirlutan, tá EB/Streymur vitjaði sunnudagin*

*Mynd: Jonhard Hammer*

Fyri aðru ferð á rað fór GÍ sunnudagin av vøllinum við fullari úrtøku. Hesa ferð vóru teir á heimavølli ímóti EB/Streymi. Gøtumenn vóru favorittar, og teir megnaðu fult og heilt at liva upp til tað, sum varð roknað við av teimum. Men tað var ikki fyrr enn í 2. hálvleiki, at tað rættuliga glapp.

EB/Streymur fylgdi við í fyrra umfarinum, og stutt undan hvíldini var tað um reppið, at Hallur Jacobsen javnaði til 1–1. Anghel Sorin legði hegnisliga inn um verjuna úr vinstru. Hallur Jacobsen, sum mannaði álopssessin undir liðini á fyrrverandi GÍ verjuálitinum, Jón Sigurð Gleðisheygg, var fyrstur á, men bólturin fór dygst omanfyri málið hjá Halli Hansen.

Í 2. hálvleiki hevði GÍ málverjin ikki nógv at gera. Næstsíðsta sunnudag vóru gøtumenn fleiri enn mótstøðumenninir í næstan ein tíma. Hesa ferð vóru gøtumenn ein stóran part av seinna umfarinum fleiri, enn mótstøðumenninir vóru. Dómarin sendi rumenska miðvallaran í vinstru hjá EB/Streymi, Anghel Sorin, undir brúsuna í ótíð. Hann hevði tvær ferðir sæð gula kortið, og so var eingin vegur uttanum, sjálvt um tað vóru fleiri, sum hildu, at samlaða sektin var í so stór fyri tilburðirnar, ið bóru tvey gul og harvið eitt reytt kort við sær.

## Málini

Helgi Lamhauge Petersen var meistari fyri tveimum teimum fyrstu málunum hjá GÍ. Tað fyrsta fekk Helgi L. Petersen í 1. hálvleiki. Bartal Eliasen sendi ein langan bólt fram í høgra horn. Sámal Joensen fekk tamarhald á í tóma økinum, og Helgi L. Petersen var fyrstur á flata innlegginum.

Sami spælarin økti til 2–0. Magni Jarnskor, sum var komin so mikið undan vøddaskaðanum, at hann var førur fyri at fylla væl út á miðvøllinum, legði fríspark innfyri úr einari støðu dygst uttanfyri brotsteigin í vinstru, og við handara stólpan stútaði Helgi í kassan aftanfyri EB/Streyma málverjan Gunnar á Steig, sum hevði fleiri fínar bjargingar.

Landsliðsmaðurin Sámal Joensen varð skrásettur fyri 3–0 málið. Aftur hesa ferð var Magni Jarnskor meistari fyri uppspælinum. Hann spældi sera snilt djúpt fram eftir miðásinum, og hóast hann varð kroystur av miðverjuni, so megnaði Sámal Joensen at varðveita yvirblikkið og úr ellivu metrum at senda framvið málverjanum, ið kendi seg noyddan at koma fram ímóti.

Hans Pauli Petersen, sum var leikbannaður, tá Gí var í Klaksvík, var aftur á ytsta miðvallarplássinum í høgru. Og tað var hann, sum setti síðsta seymin í. Eftir at hava drigið í høgru valdi hann at royna ímóti málinum, og skotið úr fjúrtan metrum fór flatt framvið málverjanum og í handara síðunetið.

## Góður botnur

Gøtumenn eru komnir heilt væl frá byrjan, og tað tykist ikki at síggja so illa út hjá teimum.

Leivur Hansen, Bartal Eliasen og Poul Ennigarð tykjast av álvara at hava funnið stevið í miðverjuni. Talið á persónligum mistøkum er minkað so at siga burtur í einki, og í nógvum førum megna teir at spæla skilagott fram á miðvøllin, har Poul Henning Jacobsen, Magni Jarnskor og Sámal Joensen arbeiða nógv.

Helgi L. Petersen arbeiddi aftur hesa ferð heilt nógv. Hann skoraði tvey mál og var tískil rættuliga eyðsýndur. Óli Hansen, sum ikki var tøkur í Klaksvík, var aftur í GÍ álopinum. Hann skoraði ikki, men Óli arbeiddi væl og nógv, og tað kundi sæð út, sum um tað bara er ein spurningur um tíð, áðrenn málini fara at koma.

Teir í EB/Streymi mundu vita, hvør leikluturin hjá teimum fór at verða í Gøtu. Dýra biðjudag eiga teir fyri fyrstu ferð í hesum umfarinum heimadyst í bestu deildini. Tað verður fyrst og fremst á Mølini, at teir skulu skava stigini saman, sum skulu tryggja teimum framhaldandi lív í 1. deild.

**GÍ-EB/Streymur4-0 (0-0)**
1-0: Helgi L. Petersen 19
2-0: Helgi L. Petersen 51
3-0: Sámal Joensen 68
4-0: Hans Pauli Petersen 87

Dómari: Eiler Rasmussen (Skáli)

GÍ: Hallur Hansen – Leivur Hansen, Bartal Eliasen, Poul Ennigarð – Hans Pauli Petersen, Magni Jarnskor, Sámal Joensen, Poul Henning Jacobsen, Henning Jarnskor – Helgi L. Petersen, Óli Hansen

EB/Streymur: Gunnar á Steig – Halltór Joensen, Esmar Eiðisgarð, Ólavur Poulsen, Alfred Jacobsen, Anghel Sorin – Andreas Joensen Dahl, Knút Vesturrún, Jóhan á Stongunum – Hallur Jacobsen, Jón Sigurð Gleðisheygg.

ÍF-LÍF 2-2 (0-1):

# ÍF kom á talvuna

**Heldur óvæntað hevur ÍF bert fingið eitt stig í teimum báðum fyrstu landskappingardystunum í ár**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Fuglfirðingar eru av mongum mettir sum heitasta uppflytaraevnið í aðru deild í ár. Eftir nøkur góð avrik í steypakappingini, var tað tí ein skelkur av teimum stóru, tá teir í fyrsta umfarinum máttu lúta fyri HB í Gundadali.

Allar helst skuldi hetta hevnast, tá teir leygardagin spældu móti LÍF, men sanneikin er helst tann, at fuglfirðingar skulu vera glaðir um, at teir hóast alt fingu eitt stig burtur úr dystinum.

Størsta partin av dystinum vóru tað nevnliga leirvíkingarnir, sum vóru omaná. Teir løgdu seg á odda í fyrra hálvleiki við einum máli frá Jonhard Høgnesen, og hesi leiðslu hildu teir eisini fast um fram til hálvleiksstøðgin.

Nakað inn í seinna hálvleik fór av álvara at síggja svart út hjá heimaliðnum. ÍF misti bóltin á veg niðan eftir vøllinum, og meðan teir soleiðis iðra seg um hetta, ger Jonhard skjótt av og skorar.

ÍF hevði tó eina litla løtu í seinna hálvleiki, har spælið veruliga tóktist at ganga eftir vild. Tað var eisini hesa løtuna, at teir fingu minkað um munin. Jan Jørgensen byrjaði sjálvur eitt álop, og eftir at bólturin eina løtu var spældur runt, varð hann sendir innfyri, har Jan sjálvur stóð klárur at enda álopið.

Løtu seinni fekk ÍF stritt seg upp á javnt. Eitt hornaspark varð sent innfyri, og eftir at Eyðolvur Petersen í fyrstu atløgu kiksaði, kundi Høgni á Lakjuni við aftaru stong senda bóltin í kassan.

## Nógv at betra

Fuglfirðingar høvdu enntá møguleikar at avgera dystin, men málverjin hjá leirvíkingum framdi onkra framúr góða bjarging, soleiðis at hetta ikki varð av nøkrum. Tað verður helst eisini verið ov nógv av tí góða, um ÍF skuldi stolið sigurin, tí størsta partin av dystinum vóru tað gestirnir úr Leirvík, sum høvdu tamarhald á. Sostatt kunnu fuglfirðingar um ikki annað staðfesta, at nógv skal betrast til komandi dystirnar, og ikki minst til tann fyrstkomandi, sum er ímóti Sumba.

**ÍF-LÍF 2-2 (0-2)**
0-1: Jonhard Høgnesen
0-2: Jonhard Høgnesen
1-2: Jan Jørgensen
2-2: Høgni á Lakjuni

gult17 cyan17 magenta17 svart17



B36-B71 4-1 (1-0):

# B36 hevur fingið ferð á

**Eftir eina heldur trilvandi byrjan í bólkaspælinum í steypakappingini, er nú líkt til at gongd er komin á spælið hjá B36. Sunnudagin vunnu teir væntaða sigurin móti B71**

1. DEILD
*Jákup Mørk*

Ein av heitu favorittunum til FM-heitið í ár er uttan iva B36. Í øllum førum hevur árstalsfelagið í høvuðsstaðnum styrkt sær væl um leikarahópin í ár, men fyrstu dystirnar í steypakappingini vóru úrslitini tó sera misjøvn.

## B71 hótti

Onkur av viðhaldsfólkunum vóru kanska eisini farin at stúra fyri dystunum, sum komu, nú álvarin í hesum er vorðin størri, men tað tykist eisini sum um leikararnir hjá B36 hava skilt boðskapin.

Í øllum førum hava úrslitini verið munandi betri nú, og teir vóru eisini størfavorittar at vinna, tá B71 vitjaði sunnudagin.

Tað var tó á ongan hátt soleiðis, at sandoyingar royndu at grava seg niður í egnum brotsteigi, tá teir komu í Gundadal. Roynt var sjálvandi at binda fyri í verjupartinum, men hinvegin vóru teir eisini sera vandamiklir framman fyri B36-málið. Millum annað vóru teir tvær ferðirnar leysir við Tróndi í B36 málinum, men Vatnhamarmaðurin bjargaði frágera væl í báðum førum.

Tí kundi B36 fara til hálvleiks við eini eitt máls leiðslu, sum varð íkomin, tá Jákup á Borg fekk møguleikan at royna seg úr ellivu metrum. Hetta hendi, tá Kári Reynheim tók beinini undan landsliðsmanninum í B71 brotsteiginum beint efir at sandoyingar høvdu misnýtt tann fyrsta stóra møguleikan.



*Við teimum trimum málunum sunnudagin kom John Petersen upp á 100 fyrstudeildarmál í Føroyum*

## 100 til John

Í seinna hálvleiki var tað framvegis B36, sum hevði yvirvág í spæli, og í mun til fyrra hálvleik fingu teir nú eisini betri pláss at spæla á. Sandoyingar vóru nevnliga ikki nøgdir við at vera aftan fyri, og heldur enn at avmarka tapið, royndu teir at ota seg niðan móti B36 málinum, soleiðis at onkrir málmøguleikar kundu spyrjast burturúr.

Onkuntíð var eisini vandi á ferð framman fyri havnarmálið, men hetta kostaði samstundis í hinum endanum, og tað gingu bert fáir minuttir, áðrenn John Petersen hevði gjørt sær dælt av hesum. Hann slapp leysur í vinstru síðu, og einsamallur við Waldemar Nowicki tvífaldaði hann leiðsluna hjá vertunum.

Kári Reynheim syrgdi tó skjótt fyri, at spenningur kom aftur í dystin. B71-venjarin, sum áður taldist millum álitini í B36-liðnum, slapp leysur, tá rangstøðufellan hjá B36 kiksaði, og einsamallur við málverjanum sveik hann ikki.

Einsamalla málið var tó bert ein fátøk troyst fyri sandoyingarnar. John Petersen skeyt tvey mál afturat, og við hat-trickinum avgjørdi hann dystin til fyrimuns hjá B36.

Triðja málið hjá John var samstundis mál nummar 100 hjá honum í føroyskum 1. deildarfótbólti. Síðani Føroyar fingu altjóða limaskap – í 1988 – eru bert tveir aðrir leikarar, sum hava rokkið hesum máltali. Kurt Mørkøre hevur skotið 114 mál fyri ávíkavist KÍ og B68, meðan Uni Arge hevur skotið 103 mál fyri HB í sama tíðarskeiði.

**B36-B71 4-1 (1-0)**
1-0: Jákup á Borg (br.) 11
2-0: John Petersen 46
2-1: Kári Reynheim 50
3-1: John Petersen 67
4-1: John Petersen 76

Dómari: Lassin Isaksen (KÍ)

B36: Tróndur – Herbert í Lon Jacobsen, Arnbjørn Danielsen, Pól Thorsteinsson – Klæmint Matras, Jan Guttesen , Jens Kristian, John Petersen, Heðin á Lakjuni – Jákup á Borg, Egil Zachariassen

B71: Waldemar Nowicki – Bernhard Petersen, Bergleif Sólsker, Bjørn Thorsteinsson – Svenning W. Hansen, Jógvan Jón Petersen, Eli Hentze, Hans Jørgen Djurhuus – Bárður Bærentsen, Kári Reynheim, Jón Brekku.

NSÍ–HB 3–2 (1–1):

# Abraham aftur upp á spæl

Við gomlu landsliðskempuni sum stýrimanni eydnaðist runavíkingum at vinna fyrsta sigurin í ár

2. DEILD
*Jóannes Hansen*

Úrslitið var tað sama, tá HB í góðveðrinum leygardagin var í Runavík, sum tað var, tá teir í fyrsta umfarinum spældu ímóti ÍF. Munurin var tann, at meðan HB vann 3–2 á ÍF, so taptu teir 3–2 ímóti NSÍ.

Mest merkisvert var tað, at Abraham Løkin var at síggja á miðvøllinum hjá NSÍ. Hann hevur einki vant, men seinast í síðstu viku vórðu ætlanirnar um, at hann leygarkvøldið skuldi vestur í Vágar við 5. deildarliðnum broyttar til, at hann skuldi á miðvøllin í 2. deild.

Abraham hevur so at siga hildið dystarvektina. Hann hevur royndirnar, og hóast hann onkuntíð hevur tuskað meiri, enn hann gjørdi hesa ferð, so megnaði hann mitt á miðvøllinum at ávirka spælið heilt nógv. Tað skuldi ikki undrað, um Abraham um heilt stutta tíð verður at síggja á besta liðnum hjá NSÍ.

Millum teir, sum leygardagin tuskaðu nógv við Løkin vóru tvíburðarnir Jan og Ken Nónklett. Tað var Jan, sum varð feldur, tá NSÍ fekk brotsspark, og Bergur Hansen umsetti til 1–0.

Bogi Midjord sendi hornaspark, tá HB javnaði. Men tað var NSÍ málverjin, sum gjørdi sjálvmál, tí hann var so óheppin at sláa bóltin í málið.

NSÍ var nógva av tíðini omaná, men HB var alla tíðina vandamikið. Ingi Rasmussen var góður á miðvøllinum, og Gunnar Mohr lúrdi alla tíðina.

Stutt eftir steðgin legði Áki Leitisstein Hansen heimaliðið framum aftur, tá hann fór sjálvur. Gunnar Mohr javnaði, tá hann gjørdist leysur í høgru í brotsteiginum og smekkaði í handara síðunetið, men NSÍ megnaði at fáa sigursmálið. Eftir langt skot úr høgru stútaði Bergur Djurhuus við handara uppstandara og í stólparótina. Bólturin fór aftanfyri málverjan, sum hevði tveitt seg, og Jan Nónklett var fyrstur á returinum.

HB royndi at leggja trýst á fyri at javna, men teir megnaðu ongantíð rættuliga at leggja trýst á NSÍ málið, har Jákup Martin Hansen eftir steðgin loysti Anfinn Thomsen av. Lítil ivi man vera um, at bæði NSÍ og HB fara at skava nógv fleiri stig saman.

GÍ-Sumba 1-7 (0-1):

# Sumba kom á flog

**Eftir trilvandi byrjanina í fyrsta umfari, fekk Sumba rættiliga ferð á móti GÍ, sum á heimavølli mátti leggja rygg til stórtap**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Tað var ein einki serliga góð byrjan hjá sumbingum, tá teir fyri viku síðani taptu fyri B36 á heimavølli. Skuldi dreymurin um uppflytan til bestu deildina gerast veruleiki, var alneyðut við einari skjótari endurreisn, og hetta kundi best gerast við einum sigri á GÍ.

## Nervar

Tað tók tó sína tíð, áðrenn tað gjørdist greitt, at sumbingarnir vóru tað nógv betra liðið leygardagin. Stóran part av fyrra hálvleiki var sera lítil munur ímillum partanar. Gøtumenn royndu í stóran mun at verja tað, sum teir longu høvdu við sær á vøllin, meðan sumbingar vóru bangnir um enn eitt óvæntað tap.

Tað kom tó bert hitt eina málið í fyrra hálvleiki, og var tað Baja hjá sumbingunum, sum fekk hetta.

Seinna umfarið lótu sumbingarnir tó ongan iva vera um, at teir vóru tað betra liðið. Seks ferðir afturat sendu teir bóltin í GÍ meskarnar, og so munaði tað lítið, at gøtumenn fingu hampað eitt sindur um úrslitið.

Við sigrinum fingu sumbingar prógvað, at hóast fleiri av leikarunum nú eru komnir nakað upp í árini, so eigur liðið framvegis at roknast millum teirra, ið stríðast um uppflytan. At teir áður hava roynt seg í bestu deildini, man neyvan vera nakar vansi í so máta.

Komandi vikuskifti fæst helst av álvara at síggja, í hvønn mun sumbingar kunnu seta sína dám á oddastríðið í deildini. Tær skulu tá royna seg móti ÍF, sum heldur ikki hevur fingið best hugsandi byrjanina upp á árið, men sum hinvegin eisini telist millum avgjørdu favorittarnar í deildini.

**GÍ-Sumba 1-7 (0-1):**
0-1: Nebojsa Velkovic
0-2: Nebojsa Velkovic
0-3: Nebojsa Velkovic
0-4: Rene Thomsen
0-5: Hans Jacob Thomsen
1-5: Hans Erik Danielsen
1-6: Hans Jacob Thomsen
1-7: Hallur Dam Joensen